

# Føroysku oljufeløgini við í norskari leitiútbjóðing

Deil:

**Jan Müller**

11.09.2014 - 16:41

Oljan.fo

Tað er metstórur áhugi fyri nýggjastu norsku oljuútbjóðingini, og millum tey mongu feløgini eru tey bæði føroysku oljufeløgini, Atlantic Petroleum og Faroe Petroleum, sum longu eru partur av leitingini á norska landgrunninum.

Tilsamans 47 oljufeløg hava latið inn umsókn at sleppa at leita eftir olju og gassi á norska landgrunninum. Sissel Eriksen, leitistjóri í Oljumálaráðnum sigur, at tað er gleðiligt at síggja, hvussu stórur áhugurin framhaldandi er fyri norska landgrunninum og teimum økjum, sum eru útpeikað.

Tað eru mongu fundini í Norskahavinum í fjør, sum eru ein partur av orsøkini til, at so nógv feløg nú bjóða uppá øki á landgrunnimnum. Hon sigur, at farið verður nú at gjøgnumganga umsóknirnar og velja út tær bestu. Tey feløg, sum verða raðfest, eru tey, sum hava stóra vitan, nýggj jarðfrøðilig konsept og ta bestu strategiina fyri leiting í økjunum